HB-KÍ:

# 100 ára gamlir unglingar

**Klassikarin ímillum HB og KÍ hevur eyka dám yvir sær, nú bæði fylla 100**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eru tað tvey feløg, sum hava uppiborið serliga nógva umrøðu í ár, so eru tað ivaleyst tey bæði føðingardagsbørnini, HB og KÍ.

Bæði runda tey runda dagin í ár, og umframt øll tiltøkini, sum verða hildin í hesum sambandi, so er einki at ivast í, at eitt meistaraheiti í bestu mansdeildini hevði komið serstakliga við hjá mongu og trúgvu viðhaldsfólkunum hjá feløgunum báðum.

Í so máta er einki at taka seg aftur í, at tað í løtuni sær út til at liggja betri fyri hjá HB, sum á heimavølli noyðist at taka favorittleiklutin á seg, nú javnaldrin vitjar.

Men í HB tykjast tey ikki hava hug til at tosa stórvegis um, hvør er favorittur og ikki til dystin.

Størsti trupulleikin her tykist vera, at Vagnur Mohr Mortensen hevur fingið okkurt slag av bruna í knæið, og tí skal Heine Fernandez gera av, hvør skal setast í miðverjuna. Her kundu Hans á Lag og Martin Christensen verið uppløgdu alternativini, men teir eru báðir tveir úti við skaða, og hóast tað hevur ljóðað, at Jan Dam nú aftur fer at taka tøk fyri HB, so er hann so ikki komin enn.

Ungir mans standa tó eisini til reiðar at taka við, og ivaleyst verður tað so, at tað verður antin Ramus Nolsøe elle Eli Thorsteinsson, sum taka sæti undir liðini á Símuni Eliasen í miðverjuni.

Í aðrar mátar er tó lítil ivi um uppstillingina. Móti B36 seinast riggaði miðvøllurin við Kára, Rúna, Heðini og Jákup sera væl, og við tveimum av bestu málskjúttunum í kappingini á toppinum, skuldi krútið í álopspartinum eisini verið í lagi.

Eisini í Klaksvík er tað miðverjan, sum voldar venjaranum størsta høvuðbrýggið. Alexandar Djordjevic hevur drigist við ryggskaða seinastu tíðina, og hann er neyvan tøkur.

Hartil noyddist Ove Nysted at gevast undir venjingini hóskvøldið, og í Klaksvík bóru tey ótta fyri, at talan kann vera um fipurskaða.

Eisini í álopinum, er nakað av fráveru, nú norski Stig Edvin Aksnes er skaddur, men her vóna tey í Klaksvík so, at hinir álopsmenninir kunnu prógva, at tað er størri dugur í teimum, enn stigatalvan higartil hevur víst.

VB-B36:

# Vágbingar treingjast uppeftir

**Enn er ikki veruligur fótbóltsfepur komin í vágbingar, men við møguleikanum fyri fjórða sigrinum á rað, er oddurin av álvara farin at hómast**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er av álvara farið at lukta av fótbólti aftur í Vági. Síðani meistaraheitið í 2000 hevur tað ikki hilnast heilt so væl hjá liðnum, og tó at glottar hava verið, so hevur støðan sjáldan verið so hugalig, sum hon er nú.

Tríggir sigrar á rað hava lyft liðið upp á triðja plássið, og verður talan um sigur sunnudagin, kann eitt hol av álvara skapast niður til næstu liðini.

Og vágbingar eru hampuliga væl fyri, nú B36 kemur á vitjan. Einasta fráveran tykist vera Mindaugas, sum fekk reytt kort á Toftum, og sum tískil er leikbannaður. Dalius hevur ikki verið við í seinastuni vegna bruna í arminum, men hann er nú tøkur aftur. Eisini hevur ivamál verið um Símun Samuelsen og Anders Sørensen, sum báðir hava havt smærri skaðar, men roknað verður tó við, at teir eru tøkir.



*Vágbingar tykjast stevna beint uppeftir, meðan kósin hjá B36 hevur verið júst tann øvuta seinastu vikurnar*

### Týðandi ivamál

Hjá B36 hevur ikki hilnast serliga væl seinastu umførini. Eftir triðja umfar vóru teir annars ovastir á stigatalvuni við sjey stigum, men í dag vísir talvan, at bert eitt stig er fingið til høldar síðani, og í Vági hevur B36 havt tað alt annað enn lætt seinnu árini.

Til sunnudagin tykist eisini ivi vera um nøkur av plássunum á B36-liðnum. Bárður Mortansson hevur havt trupulleikar við lærkrikanum, og ivasamt er, um hann verður tøkur. Tað sama verður sagt um Arnbjørn Danielsen, suim hevur fingið hald í ryggin. Heldur ikki John Petersen fekk fullført venjingina hóskvøldið, men í B36 vóna tey tó ikki, at tann snuddurin, sum hann tá fekk, fer at halda liðskiparanum aftur sunnudagin.

**1. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 6 | 4 - 2 - 0 | 14 | 5 | 9 | 14 |
| 2 HB | 6 | 4 - 1 - 1 | 17 | 7 | 10 | 13 |
| 3 VB | 6 | 3 - 2 - 1 | 10 | 5 | 5 | 11 |
| 4 NSÍ | 6 | 2 - 3 - 1 | 11 | 10 | 1 | 9 |
| 5 EB/Streymur | 6 | 2 - 2 - 2 | 12 | 9 | 3 | 8 |
| 6 B36 | 6 | 2 - 2 - 2 | 12 | 10 | 2 | 8 |
| 7 GÍ | 6 | 2 - 2 - 2 | 8 | 10 | -2 | 8 |
| 8 KÍ | 6 | 1 - 4 - 1 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 9 ÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 10 | 21 | -11 | 3 |
| 10 B68 | 6 | 0 - 0 - 6 | 4 | 20 | -16 | 0 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 6 | 5 - 0 - 1 | 20 | 9 | 11 | 15 |
| 2 Royn | 6 | 4 - 0 - 2 | 17 | 12 | 5 | 12 |
| 3 B71 | 6 | 4 - 0 - 2 | 16 | 16 | 0 | 12 |
| 4 AB | 6 | 3 - 2 - 1 | 11 | 8 | 3 | 11 |
| 5 FSV | 6 | 3 - 1 - 2 | 19 | 10 | 9 | 10 |
| 6 Sumba | 6 | 3 - 1 - 2 | 11 | 10 | 1 | 10 |
| 7 B36 | 6 | 2 - 1 - 3 | 9 | 14 | -5 | 7 |
| 8 KÍ | 6 | 1 - 1 - 4 | 9 | 14 | -5 | 4 |
| 9 LÍF | 6 | 1 - 1 - 4 | 8 | 16 | -8 | 4 |
| 10 VB | 6 | 0 - 1 - 5 | 5 | 16 | -11 | 1 |

# HB heldur fram

Skal metast eftir hagtølunum, so er lítið, sum bendir á, at KÍ skal steðga góðu gongdini, sum HB er komið í eftir fyrstu laku umførini. Av seinastu tíggju dystunum móti KÍ í Havn hevur HB vunnið teir sjey. Seinasti KÍ sigurin skal finnast í 2001, tá KÍ vann eina spennandi uppgerð við 2-1.

Hitt oddaliðið, Skála, hevur ongantíð fyrr fingið stig móti GÍ, tá liðini hava hitst í bestu deildini. Men tað er tó mangt, sum plagdi at venda niður, sum vendir upp á Skála í hesum døgum.

Runavíkingar taka móti EB/Streymi, og her hevur NSÍ hvørja ferð fingið fult, og so er spurningurin, hvørt tað eisini fer at henda hesaferð.

Seinastu tveir dystirnir tykjast rættiliga javnir, um metast skal eftir hagtølunum. Í Vági stendur mest sum á jøvnum millum VB og B36, sum bæði hava vunnið tríggjar dystir í part seinastu tíggju árini. Vert er tó at leggja til merkis, at seinasti B36 sigurin er afturi í 1997, og at teir tríggir VB-sigrarnir eru fingnir til vega seinastu fýra árini.

Og eisini í Fuglafirði benda hagtølini á ein javnan dyst. Her er seinastu dysturin millum liðini tó afturi í ’99, men hóast hetta, so bendir eisini verandi stigatalvan á, at talan verður um javna uppgerð.

Sum vant, so sýnir talvan, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini um vikuskiftið hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

**-jm**

| | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | 94 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ-EB/S | 3-0 | 4-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 4-2 | 4-0-0 | 12-2 |
| HB-KÍ | 3-2 | 4-1 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 4-0 | 3-0 | 3-3 | 5-0 | 2-1 | 7-1-2 | 27-11 |
| VB-B36 | 0-0 | 2-1 | 2-1 | 1-0 | 0-0 | 1-1 | 1-2 | 1-3 | 1-2 | - | 3-3-3 | 9-10 |
| Skála-GÍ | 0-2 | 1-2 | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-2 | 1-4 |
| ÍF-B68 | - | - | - | - | 2-4 | 2-2 | 1-3 | 2-1 | - | 1-0 | 2-1-2 | 8-10 |



# Miðverjan er burtur

**EB/Streymur skal skipa seg av nýggjum, tá ið teir í kvøld verða annar parturin av stevnudystinum í Runavík, har pílurin hjá heimaliðnum peikar rætta vegin**

NSÍ-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Stevnudysturin í Runavík verður longu í kvøld. EB/Streymur vitjar, og gestirnir hava alla orsøk til stórt sjálvsálit. Síðsta sunnudag vunnu teir stórsigur á heimavølli ímóti ÍF. NSÍ hevur eisini havt undanvind síðstu vikurnar, og tað kann væl vera, at tað liðið, sum megnar at fáa fulla úrtøku í kvøld, fer at blanda seg upp í toppstríðið.

Teir í EB/Streymi eru ikki so væl fyri hesa ferð, sum teir vóru fyri einari viku síðani. Miðverjarnir báðir eru rættuliga ivasamir. Fróði Clementsen, sum skoraði eitt av teimum sjey málunum ímóti ÍF, hevur verið seingjarliggjandi alla vikuna. Í gjár var rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í kvøld. Pacek varð skaddur ímóti ÍF. Hann hevur ikki vant síðani, og alt bendi í gjár á, at hann ikki verður førur fyri at spæla í kvøld.

Hallur Jacobsen fór út ímóti ÍF, tí hann var skaddur. Hann verður við í kvøld. Sannlíkt er tað, at Marni Djurhuus, sum ikki hevur verið fastur maður seinastu ferðirnar, verður annar miðverjin, og at Gert Hansen verður í hinum plássinum.

### Messias invalid

NSÍ hevur seinast fýra ferðirnar fingið stig. Tvær ferðir hava teir spælt javnt á útivølli, og tvær ferðir hava teir vunnið á heimavølli. Allir teir spælararnir, sum hava verið við tær seinastu ferðirnar, eru tøkir hesa ferð.

Í fjør varð brasiliumaðurin Messias Perreira kosin ársins spælari í NSÍ. Í ár hevur hann spælt millum lítið og einki, og nú er greitt, at hann ikki fer at spæla meiri við NSÍ. Messias er plágaður av knæskaða, sum tað tykist vónleyst at sleppa av við. Nú er Messias vorðin fótbóltsinvalid, og hann fer til hús um mánaðarskiftið.

Messias kom fyrstu ferð til Føroya í 1999. Tá spældi hann við B68, og tað gjørdi hann eisini í 2001 og í 2002. Í fjør skifti hann til NSÍ.

# Jan verður á ÍF miðvøllinum

**Talan verður um lyklauppgerð bæði hjá ÍF og B68, tá ið tey bresta saman í Fuglafirði í morgin**

ÍF-B68
*Jóannes Hansen*

Tað stendur nógv upp á spæl, tá ið B68 í morgin fer um Varmakeldueið at vitja ÍF og fuglfirðingar. Fyri fyrstu ferð í øll tey árini, síðani toftamenn í 1981 fyrstu ferð royndu seg í bestu deildini, hava teir einki stig fingið, eftir at fyrsti triðingurin av kappingini er lagdur afturum.

ÍF fekk trý stig í fyrsta heimadystinum, sum var ímóti NSÍ. Síðani hava teir verið púra sørir, og nú hava teir fingið sær styrk aðrastaðni frá. Jan Guttesen, sum undanfarnu árini hevur verið álit á B36 miðvøllinum, og sum nú er undir útbúgving í Keypmannahavn, skal hjálpa ÍF. Tað fer hann fyrstu ferð at gera í morgin. Í Fuglafirði vóna teir, at Jan skal fáa skil á fótbóltsspælið á miðvøllinum, sum teir halda ikki hevur verið nóg stinnur seinastu ferðirnar

Eiðisferðin síðsta vikuskifti kostaði nógv hjá ÍF. Umframt stórtapið so mistu teir Bartal Eliasen og Fritleif í Lambanum, sum báðir sóu reytt. Bartal er leikbannaður í morgin. Tað er Fritleif ikki. Hann avgreiddi leikbannið, tá ið ÍF unglingarnir spældu mikukvøldið.

Rúni Elttør fekk gult kort á Eiði, og so fall hamarin. Hetta var triðja gula kortið, og Rúni er tískil leikbannaður í morgin.

### John Heri afturkomin

Hjá B68 verður miðverjin Herbert í Lon Jacobsen ikki við í morgin. Hann fekk triðja gula kortið ímóti VB og er tískil leikbannaður.

John Heri Dam hevur undanfarnu árini spælt á Toftum. Í vár hevur hann verið í Danmark. Hann hevur vant við Fremad Amager, har hann eisini hevur spælt við næstbesta liðnum, tá ið hann ikki hevur verið skaddur. Nú er John Heri aftur á klettunum, og hann verður í B68 hópinum í morgin.

Sambært skipanini skuldi dysturin millum ÍF og B68 verið spældur mánakvøldið. Men hann er fluttur til seinnapartin sunnudagin. Upprunaliga skuldi dysturin í Runavík millum NSÍ og EB/Streym verið spældur sunnudagin. Men hann er fluttur til leygarkvøldið. Tá ið tað var greitt, bóðu toftamenn ÍF um at flyta dystin teirra millum til sunnudagin. Tað høvdu fuglfirðingar einki ímóti. Báðir partar sigast dáma væl, at tað verður spælt í vikuskiftinum og ikki aftaná, at spælararnir hava verið til arbeiðis allan dystardagin.

